gult cyan magenta svart



# Ólavsøkan gav metinntøku

*Í fjør var inntøkan beint undir milliónina, meðan hesaferð kom meir enn milliónin í kassan*



Dia Midjord

Í fjør fingu tey fimtan ítróttarfeløgini 30.000 krónur í part, men tað er ikki vist, at upphæddin verður meir í ár. Birgir Sondum í Tórshavnar Ítróttarráð sigur, at tvey feløg eru komin aftrat í ár.

– Umframt at peningurin skal býtast millum 17 feløg, so eru útreiðslurnar eisini fleiri hesaferð, sigur hann.

**Metinntøka**

Tað eru Kristianna Høgnesen og Birgir Sondum, ið manna nevndina í Tórshavnar Ítróttarráð. Kristianna hevur verið í ráðnum í sekstan ár og Birgir í tólv ár.

– Ongantíð í okkara tíð hevur inntøkan verið so stór, sigur Birgir Sondum.

Tey bæði eru eisini á einum máli um, at ítróttarfeløgini hava gjørt eitt megnar arbeiði hesaferð og eiga rós uppiborið.

– Hetta er fyrsta ferðin, at allir básarnir hava verið røktir til fulnar, og tað hevur givið tað góða úrslitið, sigur Birgir Sondum.

# Loyvini givin um tvær vikur

*Viðgerðin av umsóknunum frá oljufeløgunum hevur gingið skjótari enn væntað, og fyrstu leitingarloyvini verða givin um fjúrtan dagar*

Dia Midjord

Løgmaður segði í røðu sínari á ólavsøku, at landsstýrismaðurin í hesum døgum samráðist við oljufeløgini. Løgmaður roknaði við, at fyrstu loyvini kundu latast um einar tvær til tríggjar vikur.

Tá leitingarloyvini eru givin í heyst, fer landsstýrið at leggja eina frágreiðing fyri løgtingið. Eftir ætlan skal henda frágreiðing verða liðug 1. november og verða grundarlag undir einum aðalorðaskifti um oljumál.

# Fleiri løstað í nevaleiki

*Boksibólturin í kommunuskúlagarðinum gav fleiri óvæntaða mótstøðu á ólavsøku, og nógv konufólk í høgum skóm skeiklaðu sær fótin*

Dia Midjord

Skaðastovan á Landssjúkrahúsinum hevði úr at gera um ólavsøkuna. Eini tíggju av teimum, ið royndi seg sum nevaleikarar í kommunuskúlagarðinum á ólavsøku, endaðu á skaðastovuni við pínu í handliðinum.

Frants Róin, vakthavandi lækni á skaðastovuni, sigur, at boksibólturin gav teimum nógv at gera hesar dagarnar. Og Buffalo skógvarnir oyðiløgdu eisini ólavsøkuna hjá fleiri konufólkum.

– Vit høvdu vitjan av fleiri konufólkum, ið høvdu traðkað á fløskur og skeiklað sær fótin. Nógv vóru eisini dottin og høvdu skorið seg av glasi, sigur Frants Róin.



*Teir sokallaðu Buffalo skógvarnir oyðiløgdu ólavsøkuna fyri fleiri konufólk*
*Mynd. Jens Kr. Vang*

**Fleiri brotna nøs**

Harðskapur hoyrir eisini ólavsøkuni til. Á skaðastovuni eru fleiri viðgjørd fyri næsabrot.

– Hesar báðar dagarnar eg var til arbeiðis, høvdu fimm fólk brotið nøsina. Ein hevði eisini fingið tveir fingrar í eygað.

Frants Róin leggur aftrat, at teir eisini hava viðgjørt ein ungan mann, ið var skotin í hálsin við luftbyrsu. Hesin hevði arbeitt í skjótiteltinum, tá hann brádliga var raktur av einum skoti frammanífrá.

– Serliga nógv var at gera hóskvøldið og ólavsøkuaftan. Leygardagin var toluliga friðarligt, sigur Frants Róin, vakthavandi lækni á skaðastovuni.

# Bert telefonin tikin á ólavsøku

*So nógv hevur verið at gjørt á Politistøðini í sambandi við ólavsøkuna, at nærum alt annað arbeiði hevur ligið á láni*

Dia Midjord

Á Politigarðinum í Havn hava tey næstan ikki havt yvirskot til annað enn at taka sær av fullum fólki og at taka telefonina um ólavsøkuna.

– Her hevur kimað uttan íhald allan samlan dagin, og oftast eru tað fólk, ið venda sær til okkara um fullar persónar, sigur Peter Poulsen, støðleiðari.

Frá hóskvøldinum til sunnudagin hevur nærum einki verið gjørt av øðrum uppgávum.

– Vit eru so nógv upptiknir av tí, tey fullu fólkini skapa, at tað er torført at røkka longur, sigur støðleiðarin.

**Væl vitjað**

Frá hóskvøldinum og til seinnapartin sunnudagin hevði politistøðin havt 26 liggjandi gestir. Hetta eru tveir fleiri enn sama tíðarskeið í fjør. Og talan er um væl bíligari gisting enn hotellini bjóða.

– Hevur persónurin einki skeivt gjørt, men einans hevur drukkið ov nógv, so taka vit ikki pening frá honum, sigur Peter Poulsen.

Og nakrir gestir fáa betri sømdir enn aðrir. Tað kemur nevniliga meir enn so fyri, at konufólk koma á vitjan, og tey fáa einkult kamar. Koma fleiri í senn, so mugu eisini konufólkini sova fleiri í einum kliva.

**Breyt tenn**

Sambært støðleiðaranum so hava eini fimm bilar fingið speglini rivin av á ólavsøku. Harðskapur hevur eisini verið, og ein persónur fekk so dyggan frammaná, at tvær tenn brotnaðu.



*Á Politigarðinum í Havn hevur telefonin ringt alla somlu tíðina, hesar dagarnar ólavsøkan hevur verið*

Eingin bleiv tikin fyri rúsdrekkakoyring á ólavsøku, men politistøðin fekk nakrar fráboðanir.

– Vit vóru úti og steðgaðu onkrum, sum ætlaði sær at koyra, men tað spældi væl av, sigur Peter Poulsen.

gult cyan magenta svart



# Kókaði á Ólavsøkukonsertini

*3000 fólk vóru til stóru rockkonsertina hóskvøldið, sum veteranarnir í Frændum endaðu við einum ordans braki*



*Poul Arni Holm úr Wild Child syngur fyri teimum mongu áhoyrarunum á Ólavsøkukonsertini. Mynd: Jens Kristian Vang*

Eyðun Klakstein

Ólavsøkukonsertin gjørdist eitt veruligt brak av eini konsert. Trý túsund fólk vóru á konsertini, sum var í Kommunuskúlagarðinum hóskvøldið, og serliga móti endanum av konsertini var rættiligur futtur í.

Tað er FUT, sum stendur fyri Ólavsøkukonsertini, og í ár kundu teir millum annað lokka við eini forkunnugari framførslu hjá Frændum, sum man vera best umtókti føroyski tónleikabólkurin nakrantíð.

Og tað sást eisini aftur á konsertini.

Frændur endaði konsertina, og tað var sjón fyri søgn, at teir framvegis hava eitt serligt tak á áhoyrarunum. Teir spældu nakrar av teimum mongu kendu sangunum, sum teir hava gjørt, og konsertfólkið livdi rættiliga við hesi framførsluni.

– Frammanundan ivaðust vit í, um tey ungu kenna sangirnar hjá okkum, og tí vistu vit heldur ikki, hvørja móttøku vit skuldu vænta okkum. Men tað var ein fragd at síggja, at eisini tey yngstu sungu við, tá vit spældu sangir sum Føroyar og Lívsmynd, sigur Steintór Rasmussen, yrkjari og sangari í Frændum.

**Langt ímillum snapsirnar**

Tað er langt ímillum framførslurnar hjá Frændum, og nú teir aftur vóru á palli, kundu teir fegnast um, at teir vóru minst líka væl umtóktir, sum teir áður hava verið.

– Hóast vit hava spælt í nógv ár og ofta hava spælt fyri nógvum fólki, so hava vit ongantíð spælt fyri so stórar áhoyrarafjøld sum hesari, sigur Steintór Rasmussen.

Men hóast væleyndaðu framførsluna á Ólavsøku, so skal eingin vænta, at Frændur fer at verða ofta at hoyra í framtíðini.

– Vit eru ongantíð rættiliga givnir at spæla, men vit hava allir annað at takast við enn júst Frændur. Tað er hugaligt at spæla, tá tað gongur so væl sum hesaferð, og vit fara ivaleyst á pallin aftur í framtíðini, men tað verður ikki ofta, sigur Steintór Rasmussen.

**Pengar í kassan**

Saman við Frændum lokkaðu bólkar sum All That Rain, Clickhaze, Tangz og I Am tey mongu fólkini á Ólavsøkukonsert.

So at siga alt gekk upp á stás undir konsertini, og bæði áhoyrarar og tónleikarar fegnaðust um, at konsertini var væl fyriskipað, og at tíðarætlanin helt rættiliga væl.



*3000 fólk vóru á ársins Ólavsøkukonsert, sum gjørdist ein tann best eydnaða nakrantíð. Mynd: Jens Kristian Vang*

Sølan av teimum umleið 3000 atgongumerkjunum hevði við sær eina inntøku upp á knapt 400.000 krónur, og hóast tónleikabólkarnir fingu ein part av køkuni, so rullaðu nógvar krónur niður í kassan hjá FUT.

FUT hevur ikki verið serliga virkið seinastu árini, men afturvendandi Ólavsøkukonsertini er vorðið eitt lítið gullnám hjá felagnum.

# Seta tiltøk í verk fyri at tálma veiðitrýstið

*Veiðitrýstið á fiskastovnarnar undir Føroyum er ov stórt, og tí fer landsstýrið at seta tiltøk í verk fyri at tálma trýstið*

Eyðun Klakstein

Arbeiðið at orða ein greiðan fiskivinnupolitikk heldur fram, og landsstýrið miðjar eftir at leggja eitt uppskot fram í hesi tingsetuni.

Hetta segði Anfinn Kallsberg í løgmansrøðuni, tá tingið varð sett á ólavsøku.

– Reguleringstiltøkini skulu tryggja endamálsorðingarnar í lógini um vinnuligan fiskiskap, so fiskastovnarnir undir Føroyum verða gagnnýttir burðardygt við fiskidøgum, stongdum økjum og friðingum á gýtingarleiðum, segði løgmaður.

Hann vísti á, at veiðitrýsið framvegis er ov stórt, og at landsstýrið tí – eins og tað hevur fráboðað – má seta tiltøk í verk, sum fara at minka um veiðitrýstið, so tað svarar til tað, sum fiskistovnarnir tola.

Framyvir verður eisini neyðugt at halda fram við at gera fiskirættindini meira umsetilig.

Løgmaður greiddi í røðu síni frá, at fiskiveiðiavtalurnar við onnur lond geva minni av botnfiski í 2000, samstundis sum útlendsk veiðirættindini á føroysku landleiðini eru skerd.

– Størsta niðurgongdin í botnfiskakvotunum stavar frá niðurskurðinum í Barentshavinum. Við teimum góðu fiskaprísunum eru tó útlit til, at hetta árið hjá fiskivinnuni verður eins gott og undanfarna ár, segði løgmaður.

Byggingin av nýggja vaktarskipinum gongur eftir ætlan, og skipið verður í Føroyum fyrst í oktober mánaði. Við tveimum stórum skipum verður Fiskiveiðieftirlitið og Bjargingartænastan nógv betri.

– Arbeitt verður eisini við at samskipa tyrlutænastu til bjarging, sjúkraflutning og ferðaflutning.

Í sambandi við komandi tilbúgvingarætlan fyri Føroyar er ætlanin at skipa eina støð, ið skal standa fyri bjargingini á sjónum. Vaktar- og Bjargingartænastan skal hava leiðsluna av støðini, og skal sum frá líður yvirtaka leiðsluna á hesum øki frá Færøernes Kommando.

At enda í partinum um fiskivinnuna segði løgmaður, at nevndin, sum landsstýrið setti at fyrireika eina yvirtøku av skipaeftirlitinum, fer í næstum at leggja uppskot fram. Landsstýrið skal síðani taka støðu í málinum